# Nýggi lærdi háskúlin til hoyringar

**Lógaruppskotið um samanlegging av Fróðskaparsetrinum, Læraraskúlanum og Sjúkrarøktarfrøðisskúlanum hevur verið á landsstýrisfundi í morgun og fer nú til hoyringar**

SKÚLAMÁL

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Jóannes Dalsgaard, formaður í bókinum, sum hevur fyrireikað lógaruppskotið, handar Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra, uppskotið*

Nú er fyrireikandi arbeiðið at leggja saman Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya komið so mikið langt, at uppskot um lóg fyri nýggja stovnin er liðugt. Lógaruppskotið hevur í morgun verið á landsstýrisborði, og í gjár varð tað sent til hoyringar hjá avvarðandi stovnum og feløgum.

- Ætlanin er, at nýggi stovnurin skal vera sjálvsognarstovnur, sum verður stýrdur av stýri, sum verður mannað við umboðum fyri starvsfólk og lesandi, og har meirilutin verða uttanhýsis limir, sum landsstýrismaðurin í mentamálum velur. Ein av uppgávunum hjá stýrinum verður at seta rektara, sum fær víðar heimildir, sigur Mentamálaráðið í tíndaskrivi.

Ætlanin er, at nýggi stovnurin í gransking og undirvísing skal vera ein týðandi drívmegi í føroyska samfelagnum og harvið eisini vera debatskapandi. Hartil skal nýskipaði stovnurin samstarva við samfelag og vinnu og tryggja, at tann vitan, ið verður savnað og skapað á stovinum, kemur øllum samfelagnum til góðar.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, fegnast um, at arbeiðið nú er komið so mikið langt, at allar orsøkir eru at rokna við, at lógin kann verða lýst í hesum árinum. Hann heldur tað eisini vera týdningarmikið, at Løgtingið fær góða tíð og góðar umstøður at viðgera lógaruppskotið.

- Hetta uppskotið er í tráð við samgonguskjalið og eisini Visjón 2015. Tað ber eitt nú við sær, at allar útbúgvingarnar verða skipaðar sambært Bolognayvirlýsingini. Hetta fer at lætta munandi um í samskiftinum millum føroyska undirvísingar- og granskingarumhvørvið og stovnar og skúlar uttan fyri Føroyar, har tað verður granskað og undirvíst, sigur Jógvan á Lakjuni.

Landsstýrismaðurin ivast ikki í, at samanleggingin fer at gagna øllum trimum stovnum og teimum lesandi við tað, at vit fáa ein nýggjan sera sterkan stovn við tí besta frá øllum trimum stovnum við granskingargrundaðari undirvísing á hægsta altjóða stigi og høgt raðfestari gransking. Hetta fer at gagna teimum økjum, ið skulu taka ímóti teimum, sum taka prógv, og hetta fer at gagna samfelagnum í eini framtíð, har eftirspurningurin eftir vælútbúnari arbeiðsmegi verður stórur.

Tey, sum hava fyrireikað lógaruppskotið, eru Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálaráðnum, formaður, Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, Jóannes Hansen, rektari á Føroya Læraraskúla, og Súsanna Mortensen, rektari á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. Skrivarar hava verið Annika Sølvará, setursskrivari á Fróðskaparsetri Føroya, og Kristianna Sjóvará Jacobsen, fulltrúi, sum Jørgen Meitilberg, fulltrúi, loysti av fyrr í ár.

temp-team
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM

Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**

TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**

VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Ráðstevna

Vinnumálaráðið skipar fyri almennari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 21. september kl. 14.00 til 16.30, har ljós verður varpað á spurningin:

***Hvussu fáa vit betri javnvág millum arbeiðs- og familjulívið, nú traditionella lívsmynstrið er í broyting, ja kanska hótt?***

Á ráðstevnuni fara Linda Nielsen, professor dr. jur. í familju- og arvarætti á Københavns Universiteti og formaður í donsku Familie- og Arbejdslivskommissionen, Kristine Stricker Hestbech, sóknarprestur, fyrilestrahaldari og limur í donsku kommissiónini, og Hege Storhaug, journalistur, rithøvundur og kunningarleiðari hjá Human Rigths Service, Noreg, at luttaka við framløgum og fyrilestrum.

Hege Storhaug gav í 2006 út bókina »Men størst av alt er friheten«, sum viðger ringu støðuna hjá mongum innflytarakvinnum í Noreg. Bókin var mest selda bók í Noreg í 2006.

Tiltakið er ókeypis